# ítróttur

Nr. 64 • hósdagur • 30. mars 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

Joan M. Djordjevic, Stjørnan:

## – Verjan var knasandi



*Joan M. Djordjevic*

Ein av mongu Stjørnuleikarunum, sum í gjár vann enn eitt gullmerki, er Joan Midjord Djordjevic. Hon var sjálvsagt ógvuliga fegin um, at tað eydnaðist Stjørnuni aftur at vinna føroyameistaraheitið.

– Eg haldi, at vit vóru meiri klárar til sjálva uppgávuna. Vit vóru uppsettar frá fyrsta bríksli, hóast tað gekk eitt sindur striltið við at koma ígongd. Soleiðis er tað tó ofta, tá ið man spælir slíkar dystir, at man hevur eitt sindur av nervum, tá ið dysturin byrjar, segði Joan eftir dystin.

Sjálvt helt Joan M. Djordjevic, at dysturin var merktur av tveimum sera væl virkandi verjum og tveir serstakliga vælspælandi málverjum.

– Neistaverjan var góð, og vit høvdu stórar trupulleikar við at spæla okkum ígjøgnum í fyrra hálvleiki, og Manuela stóð eisini stak væl í málinum hjá Neistanum. Hinvegin haldi eg, at verjan hjá okkum var knasandi allan dystin, og ikki minst stóð Agne í málinum ein branddyst, segði spælskiparin hjá Stjørnuni eftir dystin.

Eftir at tað í steðginum hevði verið ógvuliga javnt, dró Stjørnan frá Neistanum, og hóast klaksvíkskvinnur næstan ikki skiftu út, bilaði tað ikki við orkuni.

– Vit høvdu ikki brúk fyri hvíldini. Tá ið tú liggur omaná, sum vit gjørdu í seinna hálvleiki, fært tú eyka orku, og tí fingu vit spælt við fullari orku allan dystin, segði Joan.

Spælskiparin hjá Stjørnuni hevur verið við í nøkur ár nú og vunnið nógv, og hugurin at spæla er framvegis sera góður.

– Vit eru ein stamma, ið hevur verið við leingi, og eg haldi, at tað hevur sera stóran týdning við hesari stammuni. So leingi sum tú vinnur, er hugurin at spæla eisini sera góður, so vit verða klárar aftur komandi kappingarár, segði Joan M. Djordjevic eftir dystin.

Sjálv visti Joan ikki, hvat fór at henda í Klaksvík, tá ið Stjørnan kom heim aftur við gullinum, men hon ivaðist tó ikki í, at okkurt fór at verða gjørt.

---

Jógvan L. Nolsøe, Stjørnan:

## – Eitt liðavrik



*Jógvan L. Nolsøe*

Hjálparvenjarin hjá Stjørnuni, Jógvan Leivur Nolsøe, var ein ógvuliga fegin maður eftir finalusigurin hjá Stjørnuni mikukvøldið, og hann ivaðist ikki í, at tað var eitt liðavrik, ið syrgdi fyri, at gullið nú kom aftur til Klaksvíkar.

– Hetta var ein dystur, har allar arbeiddu hart fyri sakini, so talan var um eitt satt liðavrik. Eg haldi, at verjurnar hjá báðum liðunum vóru serstakliga góðar, og ikki minst málverjarnir. Tað vóru bestu málverjarnir í landinum, sum spældu í dag. Fyri nøkrum árum síðani var Manuela hjá Neistanum tann besti, men eg haldi, at okkara Agne nú hevur yvirhálað hana, og báðar vístu sínar dygdir í dag, segði Jógvan Leivur eftir dystin.

Jógvan Leivur helt, at ein avgerandi munur millum liðini bæði, eru royndir, ið ein stórur partur av liðnum hjá Stjørnuni hevur.

– Okkara eru ógvuliga royndar, og tað hevur nógv at siga. Neistin hevur kanska ein breiðari hóp enn vit, men eg haldi, at okkara lið er sterkari, og tí er tað eisini uppiborið, at vit vunnu meistaraheitið í dag, segði hjálparvenjarin hjá Stjørnuni.

---

Ása á Neystabø, Neistin:

## – Ótrúliga vónbrotin



*Ása á Neystabø*

Tað vóru nakrar skuffaðar neistagentur, sum sótu eitt sindur fyri seg sjálvan, eftir at triði og seinasti finaludysturin móti Stjørnuni var leiktur, og gullið var gloppið teimum av hondum. Ein teirra, Ása á Neystabø, segði soleiðis eftir dystin:

– Eg haldi, at munurin á liðunum báðum í dag er, at tær fáa meginpartin av sínum skotum inn, meðan vit ikki fáa. Vit raktu rættuliga ofta stengurnar, og tær vóru eitt sindur neyvari enn vit, segði Ása á Neystabø. Hon iðraði seg tí um, at tá ið nú Neistaverjan riggaði so mikið væl, sum hon gjørdi í seinasta finaludystinum, at tað ikki gekk betur í álopspartinum.

– Eg má viðganga, at eg eri ómetaliga vónbrotin nú. Vit hava havt takið á teimum seinastu dystirnar, og eg haldi eisini, at vit hava eitt betur lið enn tær við einum breiðari hópi, segði Ása eftir dystin.

Í mun til teir báðar undanfarnu finaludystirnar hevði Neistin ikki Biritu Wardum við á liðnum hesaferð, tí henni barst undan at koma heim úr Danmark. Ása á Neystabø helt tó ikki, at saknurin var so eyðsýndur, sum man kanska hevði væntað.

– Sjálvandi saknaðu vit Biritu, men eg haldi ikki, at tað var tað, ið gjørdi munin. Birita er fyrst og fremst álitið í verjuni hjá okkum, og verjan hjá okkum koyrdi knasandi væl í dag. Tað var álopið, ið sveik, segði Ása.

Unga Neistakvinnan leggur tó dent á, at kappingarárið í ár hevur verið serstakliga gott hjá Neistanum. Hon sigur, at ikki minst hevur samanhaldið á liðnum verið ómetaliga gott, og hon ivast ikki í, at tær koma sterkt aftur komandi kappingarár.

**tn**